tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 05.05.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, ~~Eyð Jóna Eidesgaard~~, Arnfinn Bech

Varalimir: Tim Kristoffer Wentzlau

Ikki møtt: Eyð Jóna Eidesgaard

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 35/26 | 26/00073-2 | BHS -uppskot til strategi |
| 36/26 | 26/00168-1 | Leigusáttmálar -prístalsregulering |
| 37/26 | 26/00054-3 | Tvøroyrar Bóltfelag (TB) umsókn um fíggjarligan stuðul til virksemi felagsins í 2026. |
| 38/26 | 26/00109-2 | FSR -Umsókn um fíggjarligan stuðul róðraráðið 2026 |
| 39/26 | 25/00027-1 | Mýrifípan -útbygging og dagføringar 2025 |
| **Til kunningar** | | |
| 5/26 | 24/00258-3 | Fólkabókasøvn og samstarvsavtalur |
| 6/26 | 25/00415-1 | Tvøroyrar havn - Gjald fyri bátapláss í uttara bátahylinum (Súpanarvíkini) |
| 7/26 | 26/00001-1 | Kunning um skattainntøkur 2026 |
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, setur fundin og kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboðað, at henni berst frá at møta til býráðsfundin í dag, 5. mai 2026.

Eyð Eidesgaard hevur fyrst heitt á Jens Arna Hammerfoss Leo, ið er fyrsti (1.) valdi varalimur á lista C, Javnaðarflokkurin, til kommunustýrisvalið 12. november 2024, um at møta í staðin. Jens Arni Hammerfoss Leo hevur fráboðað, at hann ikki kann møta, og tí er heitt á Tim Kristoffer Wentzlau, sum er næstvaldi varalimur á lista C, Javnaðarflokkurin, um at møta.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Tim Kristoffer Wentzlau eru loknar.
Einmælt samtykt.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna –

Anita Vibergsdóttir ynskir at málið: “6/26 Tvøroyrar havn - Gjald fyri bátapláss í uttara bátahylinum (Súpanarvíkini)” verður sett á skrá sum mál til samtyktar. **-samtykt**

**Til støðutakan**

## 35/26
## 26/00073-2 BHS -uppskot til strategi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 11.02.2026 | 9/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 21/26 |
| 3 Býráðið | 27.02.2026 | 15/26 |
| 4 Sosiala nevnd | 22.04.2026 | 13/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 61/26 |
| 6 Býráðið | 05.05.2026 | 35/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.02.2026**
Umsitingin hevur móttikið ávegis uppskot til strategi fyri BHS saman við viðheftum framløgum og talvum. Endamálið við hoyringini er at fáa fakligar viðmerkingar til innihaldið og møgulig ávirkan á tænastur/ábyrgdarøki hjá kommununi.

**Viðheft skjøl**

- Ávegis uppskot til strategi (BHS2035)
- Framløga – eldradeplar
    - Talvur – fíggjarpartur (viðv. strategi/eldradeplum)

Sosiala deild/kommunustýrið verður biðin um at:

- meta um uppskotið út frá sosialum, røktar- og eldraøkinum,
- peika á møguligar avleiðingar, møguleikar, váðar og ressurstørv (t.d. starvsfólk, førleikakrøv, tænastustig, samstarv og fígging), og
- koma við ítøkiligum rættingum/viðmerkingum til orðingar og málsetingar, um neyðugt.

## Frágreiðing

Viðmerkingar/hoyringarsvar skulu avgreiðast **í seinasta lagi 13. februar 2026**, soleiðis at tær kunnu takast við í samlaðu viðgerðini.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 192 frá 4. desember 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ókent

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 11. februar 2026:**
Strategi ætlanin fyri BHS var umrøtt og kunnað. Sosiala nevnd tekur einmælt undir við fyriliggjandi ætlanini, og fegnast ma. um tilmælið at byggja nýggjan eldradepil á Tvøroyri.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Borgarstjórin mælir til at taka undir við fyriliggjandi strategi ætlanini fyri BHS, eins og sosiala nevnd, við tilmælið um, at umsitingin kannar møguligar staðseting á Tvøroyri, at byggja ein eldradepil á Tvøroyri, sum eftirfylgjandi verður lagt fyri stýrið í BHS. -Einmælt samtykt. -Málið verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi strategiætlanini fyri BHS, soleiðis sum sosiala nevnd og fíggjarnevndin eisini mæla til, við tí tilmæli, at umsitingin fær heimild til at kanna møguliga staðseting á Tvøroyri, har ein eldradepil kann byggjast. Málið verður síðani lagt fyri býráðið umvegis sosialu nevnd, áðrenn hetta verður lagt fyri stýrið í BHS. -Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 12. apríl 2026:**
**Málslýsing: Strategi BHS2035 – støðutakan hjá sosialu nevnd**
Kommunan hevur nú fingið til viðmerkingar og støðutakan til endaligu strategiætlanina *BHS2035 – Eldraøkið í framtíðini*, sum er samtykt av stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy. Strategiin leggur upp til eina heildarætlan fyri menning av eldraøkinum fram ímóti 2035, við denti á haldføra, góða og virðiliga eldratænastu, har borgarin er í miðdeplinum.

Í ætlanini verður serliga víst á, at eldraøkið í Suðuroy stendur yvir fyri stórum avbjóðingum, eitt nú vaksandi tali av eldri borgarum, trot á hóskandi bústaðarloysnum, starvsfólkatroti, ójøvnum tænastustigi og stórum fíggjarligum trýsti. Samstundis verður mælt til, at arbeiðið frameftir verður skipað um sjey átaksøki, harímillum fyribyrging og endurmenning, hóskandi bústaðir, "heima sum longst", faklig dygd og nærvera, og leiðsla, samskifti og samstarv.

Ein týðandi partur av strategiini er tilmælið um at skipa eldraøkið í Suðuroy við tveimum eldradeplum, har annar depilin verður í norðaru helvt av oynni, og har nýggjur depil verður skotin upp at byggja á Tvøroyri. Sambært strategiini skal ein slíkur depil fevna um nútímans røktarheim, eldravinaligar íbúðir, dagtilhald, venjingar- og felagshølir og aðrar felags tænastur, ið kunnu stuðla undir bæði betri tænastur og meiri skynsaman rakstur.

Málið verður lagt fyri sosialunevnd við tí endamáli, at nevndin tekur støðu til, um Tvøroyrar kommuna kann taka undir við høvuðskósini í endaligu strategiætlan fyri BHS2035, herundir serliga:

- at arbeiða miðvíst við fyribyrging, endurmenning og tænastum, ið gera tað møguligt hjá borgarum at vera heima sum longst,
- at styrkja arbeiðið við hóskandi bústaðar- og deplaloysnum fyri eldri borgarar,
- og at taka undir við, at nærri kanningar verða gjørdar av møguligari staðseting og karmum fyri nýggjan eldradepil á Tvøroyri. ***-Hetta er longi samtykt av Tvøroyrar býráð 26. feb. 2026.***

Málið hevur týdning fyri kommununa bæði tænastuliga, sosialt og strategiskt, tí framtíðar menningin á eldraøkinum fer at hava beinleiðis ávirkan á tænastustig, samstarv, starvsfólkatørv og kommunala langtíðarætlan. Sambært framlagda málinum hevur sosiala nevndin áður umrøtt ætlanina og tikið undir við henni, eins og mælt varð til at arbeiða víðari við kanning av møguligari staðseting fyri eldradepli á Tvøroyri.

**Tilmæli:**
Sosiala nevnd verður biðin um at taka støðu til, um nevndin kann taka undir við strategiætlanini BHS2035, *-ið var løgd fram á almennum fundi í miðnámsskúlanum 8. Apríl-,* sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy, og um umsitingin skal fáa heimild til at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri.

**<u>Sosiala nevnd 22. apríl 2026:</u>**
Sosiala nevnd tekur einmælt undir við strategiætlanini BHS2035, sum varð løgd fram á almennum fundi í Miðnámsskúlanum 8. apríl, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy. Somuleiðis tekur sosiala nevnd einmælt undir við at heita á umsitingina um at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri og at leggja málið fyri Tvøroyrar býráð umvegis sosialu nevnd.

**<u>Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:</u>**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við strategiætlanini BHS2035, sum varð løgd fram á almennum fundi í Miðnámsskúlanum 8. apríl, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy. Somuleiðis tekur fíggjarnevndin einmælt undir við at heita á umsitingina um at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri og at leggja málið fyri Tvøroyrar býráð.

**<u>Býráðið 05. mai 2026:</u>**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við strategiætlanini BHS2035, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy, samsvarandi tilmælinum frá sosialu nevnd og fíggjarnevndini. Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri, og at málið verður lagt fyri býráðið aftur, tá nærri kanningar eru gjørdar.
**Einmælt samtykt.**

**36/26**
**26/00168-1 Leigusáttmálar -prístalsregulering**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 57/26 |
| 2 Býráðið | 05.05.2026 | 36/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.04.2026**
Borgarstjórin, Kristin Michelsen, mælir til, at allir leigusáttmálar, sum Tvøroyrar Kommuna hevur, verða prístalsreguleraðir. Endamálið er at tryggja, at leiguinntøkurnar hjá kommununi fylgja vanliga prísgongdini í samfelagnum, soleiðis at sáttmálarnir verða dagførdir samsvarandi broyttum búskaparligum viðurskiftum.
**Lógargrundarlag:**
Málið byggir á heimild kommununnar sambært kommunustýrislógini at umsita kommunal viðurskifti, herundir ognir, leiguinntøkur og fíggjarumsiting. Harumframt byggir málið á galdandi treytir í teimum einstøku leigusáttmálunum og vanlig sáttmálarættarlig prinsipp.
Kommunan kann, sum liður í umsitingini av egnum ognum, áseta treytir í leigusáttmálum, herundir treytir um prístalsregulering, treytað av, at hetta er í samsvari við galdandi sáttmálarættarligar reglur og treytirnar í teimum einstøku leigusáttmálunum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein prístalsregulering av øllum leigusáttmálum viðførir øktar leiguinntøkur hjá kommununi frá januar 2027, samsvarandi kostnaðarprís.

Við prístalsregulering verður sipað til brúkaraprístalið hjá Hagstovu Føroya, sum er almenna mátitalið fyri prísgongd í Føroyum.

**Tilmælið:**
Leiga av kommunalari ogn verður framyvir árliga regulerað 1. januar samsvarandi broytingini í brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá umsitingini, at leiga av kommunalari ogn verður prístalsregulera árliga, regulerað 1. januar samsvarandi broytingini í brúkaraprístalinum.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøða fyri tilmælinum hjá fíggjarnevndini um, at leiga av kommunalari ogn framyvir verður prístalsregulerað árliga, regulerað 1. januar samsvarandi broytingini í brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya.
**Einmælt samtykt**

**37/26**
**26/00054-3 Tvøroyrar Bóltfelag (TB) umsókn um fíggjarligan stuðul til virksemi felagsins í 2026.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.02.2026 | 15/26 |
| 2 Mentanarnevndin | 22.04.2026 | 36/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 56/26 |
| 4 Býráðið | 05.05.2026 | 37/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.01.2026**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá TB, Tvøroyrar bóltfelag um fíggjarligan stuðul til kappingaráðið 2026.

> **Felagið skrivar:**
> Tvøroyrar Bóltfelag (TB) er eitt av berandi ítróttarfeløgunum í kommununi og arbeiðir miðvíst fyri at skapa eitt sterkt, trygt og mennandi fótbóltsumhvørvi fyri børn, ung og vaksin, har ítróttur, trivnaður og lokalur samleiki hanga saman.
> Í 2026 hevur felagið sett eina greiða langtíðarætlan. Thomas Thinggaard er settur sum høvuðsvenjari hjá besta liðnum í 2 ár og hevur saman við høvuðsungdómsvenjaranum Allan Smedemark ábyrgd av menningini í ungdómsdeildini, fyri at tryggja samanhang millum ungdóms- og vaksnamannafótbólt.
> Ungdómsarbeiðið er hornasteinurin í felagnum, og dentur verður lagdur á at fáa fleiri virkin, tryggja dygdargóða venjing og skapa eitt inkluderandi og trygt umhvørvi.
> Stuðulin í 2026 verður nýttur til rakstur og menning av vaksnamannafótbólti, skipað ungdómsarbeiði og venjaramenning, viðlíkahald og betran av útgerð og venjingarumstøðum, og at tryggja støðugan rakstur við hægri krøvum til fakliga dygd og struktur.
> TB takkar Tvøroyrar kommunu fyri stuðulin og ynskir, um møguligt, at stuðulin til 2026 verður á leið sama støði sum í 2025. Felagið stendur til reiðar at greiða nærri frá á fundi og hevur eisini eina ungdómsstrategi klára at leggja fram.
> Tvøroyri, 21. januar 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til at játta stuðul av FÆ2026, §524, stuðul til ítrótt

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. februar 2026:**
Ongin roknskapur er móttikið og verður málið útsett til komandi fund.

**Kommunustjórin 17.04.2026:**
Roknskapurin fyri 2025 er nú móttikin, og málið verður tí lagt fyri av nýggjum til støðutakan.
Av ársroknskapinum fyri 2025 sæst, at felagið hevði umfatandi virksemi í árinum, men at roknskapurin samstundis vísir eitt hall og negativa eginogn við árslok. Leiðslan vísir í roknskapinum á, at arbeitt verður miðvíst við at betra um raksturin, og at mett verður, at raksturin kann halda fram í 2026.

**Lógargrundarlag**
Kommunufulltrúin: Kommunan kann, innan fyri sínar karmar og sambært kommunustýrisskipanini, lata stuðul til ítróttarligt og mennandi virksemi í kommununi. Málið verður tí lagt fyri mentanarnevndina og møguliga býráðið til støðutakan.

**Fíggjarligar avleiðingar**

Verður umsóknin gingin á møti, verður stuðulin veittur av FÆ2026, §524, stuðul til ítrótt. Við metingini eigur at verða havt í huga, at roknskapurin fyri 2025 vísir hall, men samstundis eisini, at felagið hevur umfatandi virksemi og arbeiðir miðvíst við menning av bæði ungdóms- og vaksnamannafótbólti. Stuðul frá kommununi skal tí síggjast sum ein liður í at tryggja framhaldandi virksemi og menning í felagnum.

**Tilmæli**

Mælt verður til, at mentanarnevndin tekur umsóknina frá TB uppaftur til viðgerðar, nú roknskapurin fyri 2025 er móttikin, og at nevndin síðani tekur støðu til, um fíggjarligur stuðul skal játtast til virksemi felagsins í 2026.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 22. apríl 2026:**
Forkv. mælir til at lata stuðul á kr. 350.000,-. Bjarni Hammer mælir til at lata stuðul á 500.000,-. Anita Vibergsdóttir tekur støðu á býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:**
Form. í Tvøroyrar Bóltfelag TB møtti á fundin, og greiddi frá roknskapinum 2025 og gongdina í felagnum. Frágreiðingin var tikin til eftirtektar, og mælir fíggjarnevndin einmælt til, at veita felagnum, stuðul á kr. 500.000,- til kappingarárið 2026. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Borgarstjórin kunnar býráðið um, at talan er um tvey ymisk tilmæli frá mentanarnevndini, har annað tilmælið er at lata Tvøroyrar Bóltfelag (TB) stuðul á kr. 350.000,-, og hitt tilmælið er at lata stuðul á kr. 500.000,- til kappingarárið 2026. Borgarstjórin kunnar somuleiðis um, at fíggjarnevndin einmælt mælir til at veita stuðul á kr. 500.000,-.

Arnfinn Bech leggur fram broytingar uppskot, um at veita stuðul á kr. 600.000,-

Borgarstjórin kunnar um, at fyrst verður atkvøtt um broytingar uppskotið hjá Arnfinn Bech um at veita stuðul á kr. 600.000.

Fellur hetta uppskotið, verður síðani atkvøtt um tilmælið hjá fíggjarnevndini um at veita stuðul á kr. 500.000. Verður tilmælið hjá fíggjarnevndini samtykt, fellur tilmælið hjá mentanarnevndini burtur.

Verður tilmælið hjá fíggjarnevndini ikki samtykt, verður atkvøtt um tilmælið hjá mentanarnevndini um at veita stuðul á kr. 350.000,-

**Atkvøðugreiðsla um tilmælið hjá Arnfinn Bech at veita stuðul á kr. 600.000,-**

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | | X | |
| Anita Vibergsdóttir: | | X | |
| Alvi Mortensen: | | X | |
| Barbara Tausen: | | X | |
| Tim Wentzlau: | | | X |
| Bjarni Hammer: | | | X |
| Arnfinn Bech: | X | | |
| **Samandráttur:** | 1 | 4 | 2 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | | X |

**Atkvøðugreiðsla um tilmælið hjá fíggjarnevndini at veita stuðul á kr. 500.000,-**

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | X | | |
| Anita Vibergsdóttir: | | X | |
| Alvi Mortensen: | X | | |
| Barbara Tausen: | | X | |
| Tim Wentzlau: | X | | |
| Bjarni Hammer: | X | | |
| Arnfinn Bech: | | | X |
| **Samandráttur:** | 4 | 2 | 1 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | X | |

Barbara Tausen ynskir viðmerking, um at stuðulin til ítrótt verður deildur meira javnt millum feløgini.

**38/26**
**26/00109-2 FSR -Umsokn um fíggjarligan stuðul róðrarárið 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.03.2026 | 32/26 |
| 2 Býráðið | 27.03.2026 | 33/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 55/26 |
| 4 Býráðið | 05.05.2026 | 38/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.03.2026**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, har felagið m.a. skrivar at:

> *Eg skal vegna Froðbiar Sóknar Róðrarfelag søkja Tvøroyrar Kommunu um fíggjarligan stuðul fyri róðrarárið 2026. Í stuttum kann eg greiða eitt sindur frá, hvussu støðan hjá FSR er við manningum og bátum beint nú. Tað er eisini í hesum sambandið, at søkt verður um stuðul. 2025 var eitt sera gott ár, tá hugsað verður um tal av manningum. Ongantíð áður hevur felagið havt so nógvar manningar við á stevnu, á jóansøku luttóku heili 7 manningar fyri FSR. Ein skuldi trúð, at hetta var óført, men longu nú eitt ár seinni kann hetta talið tvífaldast, um ein vil. Soleiðis sum tað sær út beint nú, hava vit 12 manningar, sum hava ynskt at sleppa og rógva í summar*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
- Stuðul til ítrótt FÆ2026, §524. Søkt verður um kr. 100.000,- til at rinda helvtina av kostnaðinum fyri umvæling og klárgering av bátum í 2026.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. marts 2026:**
Forkv. mælir til at veita FSR stuðul á kr. 100.000,- samsv. teirra umsókn dagf. 9. mars. 2026. -Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið verður ikki sett á skrá til henda fundin.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini at veita stuðul á kr. 100.000,- til FSR kappingar árið 2026.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøða fyri tilmælinum hjá fíggjarnevndini, sum tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini um at veita Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR) stuðul á kr. 100.000,- til kappingarárið 2026.

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | X | | |
| Anita Vibergsdóttir: | X | | |
| Alvi Mortensen: | X | | |
| Barbara Tausen: | X | | |
| Tim Wentzlau: | X | | |
| Bjarni Hammer: | X | | |
| Arnfinn Bech: | | X | |
| **Samandráttur:** | 6 | 1 | 0 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | X | |

Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at hann ikki stemmar fyri, tí at ongin granskoðaður roknskapurin fyriliggur.

## 39/26
## 25/00027-1 Mýrifípan -útbygging og dagføringar 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.02.2025 | 4/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 21.05.2025 | 23/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 43/25 |
| 4 Býráðið | 02.06.2025 | 37/25 |
| 5 Sosiala nevnd | 29.10.2025 | 4/25 |
| 6 Sosiala nevnd | 11.02.2026 | 2/26 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 25/26 |
| 8 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 43/26 |
| 9 Sosiala nevnd | 16.03.2026 | 11/26 |
| 10 Sosiala nevnd | 22.04.2026 | 5/26 |
| 11 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 60/26 |
| 12 Býráðið | 05.05.2026 | 39/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.01.2025**
Tá Tvøroyrar býráð viðgjørdi støðulýsingina av barnagarðstørvinum -*mál 23/00268 Mýrifípan - støðulýsing av barnaansingini juni 2023, 2024*- bleiv samtykt, at fyri kunna nøkta tørvin á barnagarðsplássum, er neyðugt at útbyggja barnagarðin.

Tvøroyrar býráð samtykti hin 26. sep. 2024, at umsitingin til komandi fundi í sosialu nevnd leggur fram uppskot til bygging/útbygging av barnagarðinum og útiøkinum, samsvarandi tørvin á 20 børnum afturat verandi. Hetta sum ein liður í avtaluni við Hovs- og Fámjins Kommunu um barnaansing.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ókent

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at umsitingin saman við leiðsluni í barnagarðinum Mýrifípan fær heimild -*í fyrsta umfari*- at heita á ark. fyritøkuna, ið hevur tekna verandi barnagarðin, um at fremja uppskot, ið nøkta tørvin, og eftirfylgjandi verða løgd fyri býráðnum til støðutakan.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Sosiala nevnd 12. februar 2025:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað, og verður tikið upp á einum seinni fundi.

**<u>Sosiala nevnd 21. maj 2025:</u>**
Forkv. í sosialunevnd mælir til at byrja uppá útbýging samsv. kostnarmeting og uppskot hjá BRIM kr. 3.472mió, og at byrja verður uppá lendisarbeiði samsv. uppskot hjá BRIM kr. 2.677mió. Avsett er 4.5mió á FÆ2025. Mælt verður til at fíggja møguligan meirkostnað av innistandandi. -Einmælt samtykt.

**<u>Fíggjarnevndin 26. maj 2025:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at BRIM projekterar og bjóðar arbeiðini út hvør sær. Býráðið tekur støðu til innkomin tilboð áðrenn arbeiðini verða sett í gongd. Einmælt samtykt. -málið verður beint í býráðið sum lukka mál.

**<u>Býráðið 02. juni 2025:</u>**
Arnfinn Bech mælir til at broyta fyriliggjandi ætlan, soleiðis at henda verður staðsett longur eystur, og ikki er til ampa fyri framtíðarætlanir við Stórá.

**Atkvøtt verður um broytingar uppskot frá Arnfinn Bech**
Fyri eru Arnfinn Bech
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen,
Blankt: Barbara Tausen, Bjarni Hammer og Jens Arni Leo Hammerfoss
**Uppskoti ikki samtykt.**

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá fíggjarnevndini**
Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer og Jens Arni Leo Hammerfoss
Ímóti eru: Ongin
Blankt: Barbara Tausen og Arnfinn Bech
**Uppskoti samtykt.**

**<u>Sosiala nevnd 29. oktober 2025:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað.

**<u>Sosiala nevnd 11. februar 2026:</u>**
Georg Muller møtti á fundinum og greiddi frá, at dagføringar verða framdar. Kunna varð um at BRIM hevur gjørt eina byggiætlan yvir 3 ár. forkv. mælir til at fylgja hesari ætlan, og at arbeiði verður boði út skjótast til ber. Einmælt samtykt. Málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 10. marts 2026:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Sosiala nevnd 16. marts 2026:**
Barbara M. Tausen varð ikki við í viðgerðini av hesum málinum. Kari Joensen møtti á fundinum og greiddi frá, at hon ynskti at útøkið av spæliøkið sunnan fyri barnagarðin fær fyrstu raðfesting, nú avgjørt er at útbyggja/dagføra barnagarðin. Sosiala nevnd mælir einmælt til, at umsitingin vendir seg til Brim ark. skjótast gjørligt fyri at hoyra um tað ber til at broyta raðfestingina av arbeiðstøkunum, soleiðis at útiøkið - sunnan fyri gøtuna vestur til vøllin við Stórá- fær fyrstu raðfesting.

**Kommunustjórin 13.04.2026:**
Vísandi til omanfyri samtykt av verkætlanini uppíbygging av *Mýrifípuni* er umbøn send ráðgevunum um at lýsa, um arbeiðið kann raðfestast í byggistigum, har útiøkið sunnan fyri gøtuna vestur til vøllin við Stórá fær fyrstu raðfesting. Sambært telduposti frá ráðgevanum er projektið frammanundan býtt sundur í fak, og tí er møguligt at fremja broytingar. Ráðgevin upplýsir, at um allir ráðgevar hava tíð, kann arbeiðstilfarið verða tillagað, so tað samsvarar við tí útbjóðingarhátti, sum kommunan ynskir. Ráðgevin gerð vart við, at tilfarsprísir eru óstøðugir, og at tí kann væntast frávik í kostnaðarmetingini.

Í viðhefta yvirlitinum frá ráðgevanum eru tríggjar útgávur av byggistigum lagdar fram. Sambært **uppskoti 3** verður útiøkið/spæliplássið raðfest sum 1. byggistig í 2026 við einari samlaðari kostnaðarmeting á kr. 3.902.000. Síðani kemur sjálvur bygningurin í 2027 við kr. 3.102.000 og innandura arbeiði í 2028 við kr. 4.316.929. Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt projektið er kr. 11.320.929.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verður farið víðari við **uppskoti 3**, verður fyrsta játtanin í 2026 kr. 3.902.000 at fara til byggipláss, spæliplássútgerð og gerð av spæliplássi. Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt projektið er kr. 11.320.929, býtt yvir trý byggistig yvir 3 ár. Tað skal samstundis havast í huga, at tilfarsprísir sambært ráðgevanum eru óstøðugir, og at endaligi kostnaðurin tí kann víkja frá metingini.

**Sosiala nevnd 22. apríl 2026:**
Forkv. mælir til at raðfesta útøkið, sum byggistig 1, samsv. samtyktina í sosialu nevnd 16.03.2026, og at arbeiði verður sett í gongd í inniverandi ári. -Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at halda fast í samtyktina hjá býráðnum 2. juni 2025, sum er tilmælið hjá Sosialunevnd dagf. 21. mai. 2025, at byrja uppá útbýgging samsv. kostnarmeting og uppskot hjá BRIM.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Borgarstjórin kunnar býráðið um, at málið um útbygging og dagføring av barnagarðinum Mýrifípuni er lagt fyri býráðið til støðutakan. Borgarstjórin kunnar somuleiðis um, at í málinum fyriliggja tvey tilmæli:

**Tilmæli A – hjá fíggjarnevndini**
At halda fast við samtyktina hjá býráðnum frá 2. juni 2025, sum byggir á tilmælið hjá sosialu nevnd frá 21. mai 2025, um at byrja útbygging samsvarandi kostnaðarmeting og uppskoti hjá BRIM.
Arbeiðið verður projekterað og boðið út samsvarandi hesum, og býráðið tekur støðu til innkomin tilboð, áðrenn arbeiðið verður sett í gongd.

**Tilmæli B – hjá sosialu nevnd**
At raðfesta útøkið samsvarandi samtyktini í sosialu nevnd 16. mars 2026, og at arbeiðið verður sett í gongd í inniverandi ári.
Borgarstjórin kunnar um, at fyrst verður atkvøtt um tilmæli A. Verður tilmæli A samtykt, fellur tilmæli B burtur. Verður tilmæli A ikki samtykt, verður atkvøtt um tilmæli B.

## Arkvøtt verður um tilmæli A – hjá fíggjarnevndini 27. Apríl 2026

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | X | | |
| Anita Vibergsdóttir: | | X | |
| Alvi Mortensen: | X | | |
| Barbara Tausen: | | X | |
| Tim Wentzlau: | X | | |
| Bjarni Hammer: | X | | |
| Arnfinn Bech: | | | X |
| **Samandráttur:** | 4 | 2 | 1 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | X | |

**Til kunningar**

## 5/26
## 24/00258-3 Fólkabókasøvn og samstarvsavtalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Mentanarnevndin | 11.03.2026 | 27/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 6/26 |
| 5 Býráðið | 05.05.2026 | 5/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.09.2024**

**Upprunin til málið**
Nýggj lóg um fólkabókasøvn og tænastur

Nýggja bókasavnslógin áleggur fólkabólkasøvnum við útbúnum starvsfólki at samstarva við bókasøvn í teimum kommunum, sum ikki hava starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving.

Trý bókasøvn hava útbúnar bókavørðar. Bókasøvnini í Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu og Tórshavnar kommunu. Almanna- og mentamálaráðið hevur lagt ein leist, at Býarbókasavnið tekur upp samstarv við kommunurnar fyri sunnan (kommunurnar í Sandoy og kommunurnar í Suðuroy).

Í so fall at semja fæst við Tórshavnar kommunu um hendan leist, skal Tórshavnar kommuna gera avtalur um at býarbókasavnið veitir tænastur við kommunurnar fyri sunnan.

Kommunurnar kunnu søkja um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum, samsvarandi kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasøvnum. Stuðulin hevur seinni árini verið 1,28 mió kr. Men í nýggju bókasavnslógini er stuðulin til menning minkaður til 670tkr til Tórshavnar kommunu og sama upphædd er sett av til Klaksvíkar bókasavn og bókasavnið við Løkin við tí treyt, at ávikavist Runavíkar kommuna og Klaksvíkar kommuna samstarva við aðrar kommunur, sum ikki hava starvsfólk við bókasavns fakligari útbúgving.

Higartil hevur býarbókasavnið søkt um og fingið stuðul svarandi til 1,28 mió kr. Almanna- og Mentamálaráðið skal í kunngerð lýsa stuðulin áðrenn 1. September. Tórshavnar kommuna hevur kunnað Almanna- og mentamálaráðið um, at málið verður lagt fyri mentamálanevnd í september. Síðani verður kunnað um avgerð nevndsins.

Landið hevur ætlanir um at stuðla keyp av talgildum tænastum við 350.tkr. Býarbókasavnið fær í mesta lagið 150tkr av stuðlinum. Harumframt stuðlar landið við keyp av bókum fyri eina ókenda upphædd. Ein partur av stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastu er treytaður av, at kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy taka undir við tænastusáttmálanum við býarbókasavnið. Lógir, ásetingar o.a. Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum

**Fíggjarligar avleiðingar: ja**

**Viðgerð Tórshavnar kommuna**

***Tilmælið:***

*Tilmæli: Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og býarbókavørður í Tórshavnar kommunu mæla til, at Tórshavnar komuna ger avtalu við kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy um fólkabókasavnstænastur samsvarandi dagførdu kunngerðini og at játta Býarbókasavnið 550 tkr í meirútreiðslu í fíggjarætlanini 2025.*

***Mentamálanevndin 11. september 2024: (Tórshavnar kommuna)***

*Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.*

***Fíggjarnevndin 19. september 2024:***

*Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.*

***Býráðsfundur 19. september 2024:***

*Einmælt samtykt.*

**Tilmæli kommunustjórin hjá Tvøroyrar kommunu 22. september 2024:**

Kommunustjórin hjá Tvøroyrar kommunu mælir til, at Tvøroyrar kommuna ger avtalu við Tórshavnar kommunu um veitan av fólkabókasavnstænastur samsvarandi Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn og Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavns-tænastum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**

Málið var umrøtt og kunnað. Heitt verður á umsitingina um at samskifta við Tórshavnar kommunu um møguliga samstarvsavtalu, sum verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 26. september 2024:**

Einmælt samtykt at heimila umsitingini at samráðast við Tórshavnar kommunu og grannakommunur um samstarv um fólkabókasavn. Býráðið verður á einum seinni fundi at viðgerða uppskot til samstarvsavtalu.

**Kommunustjórin 24.02.2026:**

Nýggja bókasavnslógin og kunngerðin um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum leggja upp til, at kommunur uttan bókasavnsfakliga útbúgvin starvsfólk skulu hava samstarvsavtalu við eina veitarakommunu. Almanna- og mentamálaráðið hevur lagt leist, har **Býarbókasavnið í Havn** veitir tænastur til kommunurnar í Sandoy og Suðuroy, undir hesum **Tvøroyrar kommunu**. Tvøroyrar kommuna hevur í dag **skúlabókasavn knýtt at Tvøroyrar skúla**, og ein ætlan er um **býarbókasavn á Sjógøtu 2**, men bygningurin er enn ikki tøkur. Ein avtala við Tórshavnar kommunu tryggjar tí, at borgarar í Tvøroyrar kommunu hava fólkabókasavnstænastur í millumbils tíðarskeiðnum og at kommunan samstundis lýkur lógarásettu krøvini.

**Tilmæli**
Mælt verður til, at Tvøroyrar býráð samtykkir at **undirskriva samstarvsavtalu við Tórshavnar kommunu** um veitan av fólkabókasavnstænastum sambært leisti og galdandi lógar-/kunngerðargrundarlagi. Avtalan skal nýtast sum ein **trygging og menningarramma**, inntil býarbókasavn kann setast á stovn í egnum høli (Sjógøta 2). Samstundis verður mælt til, at avtalan verður skipað so hon:

1. greitt ásetir, hvørjar tænastur borgarar í Tvøroyrar kommunu fáa í hesum skeiði, og
2. ger eina greiða kós til framtíðar býarbókasavn (arbeiðsgongdir, skipanir og møguligar ískoytistænastur, um ynski er um meira enn grundtænastur).

**Mentanarnevndin 11. marts 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað um at samstarvsavtala er undirskriva millum Tvøroyrar kommunu og Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað

**6/26**
**25/00415-1 Tvøroyrar havn - Gjald fyri bátapláss í uttara bátahylinum (Súpanarvíkini)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 01.09.2025 | 19/25 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 23.09.2025 | 26/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 81/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 27.04.2026 | 58/26 |
| 5 Býráðið | 05.05.2026 | 6/26 |

**Málslýsing:**
Í løtuni er ikki ásett nakað gjald fyri teir bátarnar, sum liggja fyri teymi í bátahylinum

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Rógvi Thorsteinsson, havnameistari, mælir til, at ársgjaldið fyri bátar, sum liggja í longri tíð í Súpanarvíkini, skal ásetast at vera omanfyri hægsta árliga gjaldið fyri hinar bátahylarnar, sum sambært galdandi reglugerð er 3000 kr um árið. Undantiknir eru tó loðsbáturin hjá Tvøroyrar havn og M/S Thorshavn.

**Vinnu- og havnanevndin 01. september 2025:**
Einmælt samtykt at gera eina serstaka reglugerð við ásettum gjaldi fyri bátar, sum liggja í «Súpanarvíkini» kajhylinum. Mælt verður til at bátar liggja í avmarkaða tíð og at gjaldið verður ásett til eitt rímuligt dagsgjald. -málið verður á skrá til fyrst komandi fund í VHN, har havnameistarin luttekur.

**Viðm. tekniski leiðarin (GM) 22-09-2025**
Havnameistarin mælir til, at gjaldið verður sett til 150 kr/dag, alt árið. Tað er gjaldið, sum frammanundan hevur verið tikið fyri bátar, sum brúka keihylin úti á Tvøroyri.

**Vinnu- og havnanevndin 23. september 2025:**
Bjarni Hammer mælir til, vísandi til tilmælið frá havnameistaranum, at fast dagsgjald á 150 kr/dag skal ásetast alt árið.
Anita Vibergsdóttir mælir til, at frá 1. mei til 1. oktobur skulu bátar, sum liggja í Keihylinum á Tvøroyri, gjalda eitt dagsgjald áljóðandi 150 kr. Restina av árinum eigur gjaldið at vera hægsta brúgvagjald.
Barbara Tausen tekur undir við tilmælinum hjá Anitu Vibergsdóttir. Málið verður beint víðari í fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 26. september 2025:</u>**
Fíggjarnevndi mælir einmælt til, at bátar, sum liggja í keihylinum á Tvøroyri gjalda eitt fast dagsgjald á 150,- kr/dag alt árið, og at henda áseting fær virknað frá 1. januar 2026.

**Tekniski leiðarin (GM) -viðmerking tann 02.03.2026:**
Vísandi til mína egnu viðmerking tann 22.09.2025:
Rógvi Thorsteinsson, havnameistari, hevur ikki mælt til at seta gjaldið til 150 kr/dag, alt árið. Hann mælir enn til tað sama, sum stendur í málslýsingini.

**<u>Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:</u>**
Fíggjarnevndin tekur viðmerkingini hjá tekniska leiðara 02.03.2026 til eftirtektar, og mælir einmælt til, at galdandi frá 1. mai 2026 verður gjaldið fyri bátapláss í kaihylinum:
Summarhálvuna: *(1. mai til 31. aug.)* kr. 150,- pr./dag.
Vetrahálvuna: *(1. sep. til 30. apríl)* kr. 50,- pr./dag.

**<u>Býráðið 05. mai 2026:</u>**
Anita Vibergsdóttir setur fram ynskið um at málið bleiv viðgjørt sum mál til samtyktar. -samtykt.
Anita Vibergsdóttir leggur fram tilmælið um at bátar, sum liggja í Keihylinum á Tvøroyri, frá 1. mei til 1. september, skulu gjalda eitt dagsgjald áljóðandi 150 kr,  og restina av árinum (8. mðr.) skal gjaldið at vera hægsta brúgvagjald.

Atkvøtt verður verður um broytingar uppskotið hjá Anitu Vibergsdóttir.

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | | X | |
| Anita Vibergsdóttir: | X | | |
| Alvi Mortensen: | | | X |
| Barbara Tausen: | X | | |
| Tim Wentzlau: | | X | |
| Bjarni Hammer: | | X | |
| Arnfinn Bech: | | | X |
| **Samandráttur:** | 2 | 3 | 2 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | | X |

Atkvøtt verður verður um uppskotið hjá Fíggjarnevndini 27. apríl

| **Atkvøðugreiðsla:** | **Fyri** | **Ímóti** | **Blankt** |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | X | | |
| Anita Vibergsdóttir: | | X | |
| Alvi Mortensen: | X | | |
| Barbara Tausen: | | X | |
| Tim Wentzlau: | X | | |
| Bjarni Hammer: | X | | |
| Arnfinn Bech: | | | X |
| **Samandráttur:** | 4 | 2 | 1 |

| **Málið samtykt:** | JA | NEI |
|---|---|---|
| | X | |

## 7/26
## 26/00001-1 Kunning um skattainntøkur 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 3/26 |
| 4 Býráðið | 27.02.2026 | 2/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 4/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 3/26 |
| 7 Býráðið | 05.05.2026 | 7/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.01.2026**

**skattaintøkur (kunning)**

**Endamál:** At kunna býráðið um gongdina í skattaintøkum hjá kommununi higartil í ár, sum kann samanberast við fíggjarætlan, og meta stutt um væntaðu gongdina fyri restina av árinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Málið vart umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 18:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Tim Kristoffer Wentzlau

Arnfinn Bech